# norðuri

nærkast 10:30 og Dúgvan skal sigla kl. 11:00. Best er at sleppa sær víðari, tí hugsandi er at nógvir bilar eru við ein slíkan túr so nær middegi.

Út fyri Gøtuvík síggja vit flaggskip okkara Norrönu koma siglandi suðureftir.

– Nå, hon fer hendavegin. Vit síggja av og á farmaskip fara siglandi gjøgnum Mykinesfjørð, sigur Karl.

## RASMUS OG SNAR

Trupult er at meta um tíðina, og tað vísir seg at vit eru í góðari tíð í Leirvík. Hálvur tími er at bíða til næsta túr, og vit eru bilur nr. 2 í bilkø'ini. Frammanfyri okkum stendur ein sera vakur bilur við nummarspjaldrinum RASMUS, og nú kemur okkara Yaris-bilur við nummarspjaldrinum SNAR.

– Kom, latum okkum fara ein túr niðan at vita um vit sleppa inn í bowlinghøllina!

Hetta er Karl við uppá. Hann hevur bowlað einaferð áður, og hevur hoyrt um hesa nýggju høllina í Leirvík.

Inni í kaffistovuni á bensinstøðini eru nógv fólk savnað henda kaffisteðgin. Líkt er til at nógv stórmál verða havd á lofti eina slíka stund. Og aftur í dag er vegaføringin í Leirvík eitt evni.

Hóast Rambøll-frágreiðingin er heitt evni henda fyrrapartin, fáa vit loyvi at støkka inn á gólvið í bowling-høllini, og fáa enntá loyvi at royna breytirnar.

Men klokkan stendur ikki í stað. Nú sæst Dúgvan nærkast ferjuleguni, og vit gera okkum til reiðar at ganga oman til SNAR.

Henda seinasta ferð okkara tvørtur um Leirvíksfjørð skal byrja hvørja løtu. Og løtu seinni daga fyrstu húsini í Klaksvík undan.

## 5 tunlar + 1

Eins og vanligt hevur verið øll hesi árini standa hópurin av bilum við ferjuleguna eisini henda hósmorgunin.

Líkt er til, at nógvir bilførarar í Klaksvík hava hetta sum fasta rutu – at leggja leiðina fram við ferjuleguni við 1 ½ tíma millum, ella júst tá Dúgvan leggur at.

Tað er jú altíð gott at vita, hvør kemur til býin og hvør fer úr býnum. Nú ræður um at brúka henda møguleikan til fulnar, tí nú fara túrarnir at fækkast og hesin møguleikin fer í søguna.

Vit geva okkum ikki stórvegis far um hesar bilarnar, tí nú eru vit mestsum komnir á mál. Eftir standa teir 18 kilometrarnir norður til Viðareiðis.

Higartil hava vit koyrt gjøgnum fimm tunlar, og fyri okkum standa tveir aftrat – teir báðir Borðoyartunlarnir.

Men hvat – kunnu vit ikki taka ein tunnil við á ferðini aftrat? Nei, Karl hevur einki ímóti at fylgja okkum til Kunoyar, her vakurt útsýni er yvir fjørðin og vestursíðuna av Kalsoynni.



*Tað er ikki munur á postboðum, men á húsarhaldum teir skulu røkka hvønn postdag – Karl hevur 5, meðan Sunnleif postmaður á síni rutu hevur 200 húsarhald*

Hesin tunnilin til Kunoyar varð skotin ígjøgnum í 1988 – og tað var um júst hetta mundið, at Gásadalstunnilin átti og burdi verið komin, skal ein ganga eftir tí, sum Karl sjálvur heldur. So var kortini ikki.

Karl hevur onkutíð siglt gjøgnum Kalsoyarfjørðin við skipi, men ongatíð hevur hann eygleitt henda soleiðis frá landi av. Tað er líkasum at landslagið hinumegin broytir skap, tá ein sær tað frá landi av.

– Tú, tað er øgiligt sum tað er nógv broytt har á Kalsoynni. Tað sær heilt øðrvísi út higani frá.

– Ja, teir vóru eisini hepnir at fáa tunlarnar, soleiðis at ein kann koyra allan vegin av Trøllanesi til Syðradals, sigur Karl hugsunarsamur.

Hann veit av royndum, hvat tað vil siga tá politikkarar drála við slíkum loysnum, sum eru til frama fyri fjarlagnar bygdir.

Á Kalsoynni komu tunlarnir ikki ov seint. Her stendur fólkatalið at kalla í stað.

Verri var hjá teimum í Gásadali ... Hesin tunnilin kom helst ov seint. Og so er hann ikki eingang alment latin upp enn.

## Hvør skal víkja?

Svongdin er enn einaferð farin at gera um seg, og nú er tíðin komin at venda nøsini – og maganum – móti matstovuni á Viðareiði.

Nú standa tveir teir seinastu tunlarnir á hesum fyrsta parti av ferð okkara fyri framman. Lætt er at koyra norðureftir, tí vit eiga forrættin at koyra.

Tað eigur at vera eitt spæl at koyra norðureftir, men tað er tað ikki henda dagin. Miðskeiðis í eina tunlinum møta vit einum bili, sum als ikki ger tekin um at hann vil víkja fyri okkum, soleiðis sum hann eigur at gera.

Hann verður standandi á vegbreytini og flytir seg ikki. Hann stendur áraka eitt av mongu víkiplássunum, og ætlar sær ikki á nakran hátt at søkja inn higar.

Tað er bara eitt hjá okkum at gera: Vit mugu inn í hetta víkiplássið ístaðin, hóast tað ikki var á okkara síðu.

Bilurin hevur føroyskar nummarplátur, men helst er hetta onkur óroyndur bilførari sum er ávegis til Klaksvíkar.

Tann stóri spurningurin í okkara bili er, hvussu fer at verða leygardagin tá ein hópur av fremmandum bilum fara at royna hesar smølu og í allar mátar ótíðarhóskandi tunlarnar á Borðoynni.

Ótrúligt at teir ikki langt síðani eru vorðnir breiðkaðir – ella ein einstakur tunnil hevur loyst hesar av!

Úr Norðdepli er skjótt at koyra til Viðareiðis, og kl. 12:30 stundisliga stendur lítli SNAR við teim stóru monnunum í túninum við matstovuna, sum Elisabeth Nybo rekur á Viðareiði.

Vit høvdu møguleika at velja millum tríggjar rættir – neytakjøt, lambskjøt og reinsdjórakjøt. Lat ongan iva vera um, at vit ynsktu tað besta og forkunnugusta fyri gest okkara. Tað endaði við reinsdjórakjøtinum, sum var komin allan vegin av úr New Zealandi til Viðareiðis.

– Hetta smakkar óføra væl. Eg havi roynt hetta fyrr í Noreg, men tá var tað væl myrkari. Men smakkirnir minna um hvønn annan, staðfestir Karl.

Forrættur okkara var súpan og omaná fingu vit ís, sum kokkurin sjálv hevur evnað til.

Mettir og væl settir fóru vit frá borði, tí nú skuldi millumleikurin á ferðini setast í verk. Mostir Karls á Viðareiði skuldi fáa óvæntaða vitjan henda góðveðursdagin!

## – Tú sært gott út!

Stutt er at ganga frá matstovuni oman til tey gullittu



*– Dúgvan er eitt gott skip, men einki er kortini sum ein tunnil, heldur gásadalsmaðurin*

*Framhald á næstu síðu*